Ár 2012, hin 11. sept. kl. 17:30 hevði Klaksvíkar Býráð fund, har hesir limir møttu:
Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim, Atli S. Justinussen, Elsebeth M. Gunnleygsdóttur, Óli M. Lassen, Auðunn Konráðsson, Signhild V. Joensen, Jákup F. N. Mikkelsen, Steinbjørn O. Jacobsen, Óluva Klettskarð og Hans Arne Bertholdsen.

2012/104.
12/00433 Serflutningsskipanin í Norðoyggjum - roknskapur 2011

Frágreiðing um málið:
Í skrivi, dagfest 24. aug. 2012, mælir roknskaparleiðarin til at góðkenna roknskapin fyri Serflutningsskipanina fyri 2011.

SoN 29. aug. 2012: Nevndin góðtekur roknskapin.

FíN 4. sept. 2012: Nevndin tekur undir við Sosialu Nevnd 29. august 2012

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/105.
12/00863 Møgulig broyting av fundarumførum

Frágreiðing um málið og tilmæli:
Til tess at stytta um fundarviðgerðartíðina, mæla borgarstjórin og kommunustjórin til at umrøða møguleikar fyri hesum.

FíN 4. sept. 2012: Nevndin mælir til, at fundarumførini verða stytt á tann hátt, at nevndarfundirnir verða óbroyttir í viku 1, og at fíggjarnevndarfundurin síðan verður mánadagin ella týsdagin í viku 2, og býráðsfundurin síðani hóskvøldið í viku 2. Hetta fyri at stytta hvørt fundarumfar, so viðgerðin verður liðug innan 2 vikur.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt, og at fíggjarnevndarfundurin verður mánadag í viku 2.

2012/106.
12/00559 Fíggjarætlan 2013

Frágreiðing um málið:
Í tráð við samtyktu arbeiðsætlanina fyri fíggjarætlanararbeiðið 2013 hevur umsitingin gjørt eitt fyrsta uppskot til fíggjarætlan sum grundarlag fyri nevndar- og býráðsviðgerðini av málinum.

FíN 4. sept. 2012: Nevndin mælir til niðanfyri standandi útgangsstøði fyri fíggjarkarmin fyri komandi fíggjarár:

Inntøkur	148,5 mkr.
Rakstur	102,6 mkr.
	45,9 mkr.
Rentur	7,5 mkr.
	38,4 mkr.
Avdráttir	5,0 mkr.
	33,4 mkr.
Íløgur	33,4 mkr.
Javnvág	0,0 mkr.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/107.
12/00811 Niðurtøka av læknahúsum á Brekku og planering – *flyting millum høvuðskontubólkar, 1. viðgerð.*

Frágreiðing um málið:
Landsstýriskvinnan í almannamálum, Annika Olsen, hevur tikið avgerð um at byggja vardan bústað í Norðoyggjum til fólk við menningartarni í Klaksvík. Avrátt er, at bústaðurin skal staðsetast, har læknahúsini við Mylnutún standa í dag (matr. nr. 590^{h}, 590^{i}, 590^{k}, 590^{l} og 590^{m}). Í hesum sambandi er neyðugt at taka niður gomlu læknahúsini og samstundis gera grundstykkini byggibúgvin til bygging av varda bústaðnum.

TN 28. aug. 2012: Nevndin staðfestir, at tekniska økið hevur ikki pening til verkætlanina.

SoN 29. aug. 2012: Nevndin mælir til, at kr. 300.000,-, sum vórðu samtyktar at taka av barnaverndarsamstarvi til betran av atkomuviðurskiftum hjá skúlatannlæknanum, verða nýttar til niðurtøku og burturbeining av læknahúsunum á Brekku.

FíN 4. sept. 2012: Nevndin tekur undir við SoN 29. august 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/108.
12/00793 Serstøk byggisamtykt fyri miðbýarøkið

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá Býarskipanarbólkinum, dagfest 20. aug. 2012, ið greinar gongdina við ymiskum miðbýarætlanum gjøgnum tíðirnar, og sum greiðir frá tilgongdini at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri miðstaðarøkið í Klaksvík umframt eini frágreiðing um arkitektakappingina, ið skuldi virka sum byrjan upp á byggisamtyktartilgongdina.

Tilmæli:
Viðv. miðbýarøkinum:

Uppgávan er nú at snikka eina serstaka byggisamtykt til og verður tí biðið um býráðsins góðkenning til, at hendan verður gjørd við 1. virðislønar-uppskotinum sum høvuðsgrundarlag, tó við heimild til at samansjóða hetta við partar úr øðrum virðisløntum uppskotum, har umstøðurnar á staðnum krevja tað, bæði við atliti til verandi bygging, atkomuviðurskifti, parkeringsmøguleikum v.m.

Viðv. A13 (vestari armur):
Verandi áseting setir sum treyt, at øll ný- ella útbygging á økinum skal verða í tráð við góðkenda heildarætlan fyri økið. Umsitingin mælir til, at arbeitt verður út frá ásetingum, sum virða verandi bygging á staðnum, men samstundis loyva um-, út- og nýbygging eftir ásettari maksimumhædd og byggilinju út móti sjónum. – Somuleiðis verður mælt til, at latið verður upp fyri møguleikanum at gera gongugøtu framvið sjónum, og at SNA arkitektar, sum hava um hendi at rætta miðbýarætlanina til, taka sær av uppgávuni at gera útgreinað uppskot hesum viðvíkjandi.

Viðv. A10 (eystari armur):
Verandi áseting setir sum treyt, at bygging vestanfyri Nólsoyar Pálsgøtu verður framd sambært góðkendari ætlan.
Umsitingin mælir til, at sama verður galdandi her sum fyri A13, tó við tí ískoyti at minsta grundøkjavídd vestanfyri Nólsoyar Pálsgøtu framyvir verður 200 m^2.

FeN 27. aug. 2012: Mælt verður til at arbeiða víðari við vinnaruppskotinum sum høvuðsgrundarlag. - Nevndin ynskir málið aftur til viðgerðar, áðrenn støða verður tikin til endaliga planin.

BBN 27. aug. 2012: Nevdin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 27. aug. 2012.

HeiN 27. aug. 2012: Nevndin tekur undir við málinum

HaVN 28. aug. 2012: Nevndin tekur undir við viðtøkuni hjá BBN tann 27. august 2012.

TN 28. aug. 2012: Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 27. august 2012.

SoN 29. aug. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 27. august 2012.

MeN 29. aug. 2012: Nevndin tekur undir við tilmælinum

Býráðsins samtykt:
Samtykt at taka undir við tilmælinum frá býarskipanarbólkinum 20. august 2012, og býráðið ynskir málið aftur til viðgerðar, áðrenn støða verður tikin til endaliga planin.

2012/109.
<u>12/00805 Regulering í byggisamtykt, øki B6 og A15 - Norðborg</u>

Frágreiðing um málið:
Tá kommunan í 2010 keypti ognina Norðborg, var niðurfelt í keypsavtaluna § 3 soleiðis:
"Tá marknaumskipanin og formligu viðurskiftini í hesum sambandi eru lokin, verður matr. nr. 91 latið [eigaranum] aftur uttan kostnað, og rindar kommunan fyri allan kostnað í sambandi við samanlegging, sundurbýti/marknaumskipan, eins og kommunan bindur seg til at viðgera, at økið sambært byggisamtyktini verður lagt út sum sethúsaøki at byggja á"

Leisturin við marknaumskipanini og afturbering av ovara stykkinum varð valdur sum einklasta og skjótasta loysnin, tí bygningurin Norðborg stóð á tveimum matriklum, harav annar rakk helt niðan til Stoksoyrarvegin. Øll tey formligu viðurskiftini viðvíkjandi ognarviðurskiftunum eru komin upp á pláss, og verður tí málið um byggisamtyktarligu broytingina nú tikið upp til viðgerðar.

Tilmæli:
Tekniska Umsiting mælir til, at ásetingin fyri matr. nr. 91, sum liggur við Stoksoyrarveg 10, verður broytt frá B6 (vinnu- og mentanarøki) til A15 (blandað vinnu- og bústaðaendamál) – sí hjál. skjal II.

BBN 27. aug. 2012: Nevdin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 21. aug. 2012.

HaVN 28. aug. 2012: Nevndin tekur undir við viðtøkuni hjá BBN tann 27. august 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/110.
<u>12/00806 Møgulig útlegging av frítíðar-/ferðavinnuøki</u>

Frágreiðing um málið:
Í skrivi dagfest 21. aug. 2012 vísir Tekniska Umsiting á fyrispurning frá bóndanum fyri Myrkjanoyrahaga um møguleikar fyri at etablera eitt kampingpláss til húsvognar og tjøld á økinum niðanfyri vatnbrunnarnar við Ánagjógv.

Býarskipanarbólkurin hevur umrøtt málið og hevur í prinsippinum onki ímóti ætlanini, men vísir tó á ávís viðurskifti, sum mugu fáast uppá pláss, áðrenn meira hendir í málinum:

- Ongin formel umsókn ella tekning fyriliggur yvir, hvussu víða og hvussuleiðis ætlanin er at skipa økið til kamping. - Umsøkjarin er biðin um at lata kommununi hetta tilfarið.
- Umrødda lendi er ogn hjá Landsverk. - Umsøkjarin verður biðin um at útvega sær neyðuga loyvið frá Landsverk.
- Lendið liggur uttanfyri byggisamtyktina – byggisamtyktarlig áseting verður tí at orðast fyri økið.
- Staðsetingin er uttangarðs – tí krevst góðkenning frá friðingarmyndugleikunum (sí Løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing við seinni broytingum). Kommunan sendir friðingarmyndugleikunum málið til góðkenningar, tá neyðuga tilfarið fyriliggur.

Taka býráðið og avvarðandi nevndir tess undir við prinsippinum, at lendið omanfyri tunnilsvegin í Ánunum kann skipast sum kampingøki, verður tilgongdin við broyting av byggisamtyktini og útvegan av neyðugum loyvum sett í verk.

BBN 27. aug. 2012: Nevdin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 21. aug. 2012.

TN 28. aug. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli ella skrivi frá TU dagf. 21. august 2012.

MeN 29. aug. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli, 21. august 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/111.
12/00557 Flyta vegin á Sandinum - *flyting millum høvuðskontur, 1. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Koyrivegurin um Sandin er fluttur nærri útfylta økinum, har upprunaliga vegaføringin var løgd. Málið var fyri Teknisku Nevnd 12. juni 2012, har samtykt varð at fremja málið.
Býráðslimirnir Óli M. Lassen og Jógvan Skorheim ynskja málið (fígging) sett á skrá hjá Teknisku Nevnd, Mentanarnevndini, Fíggjarnevndini og Býráðnum í august-september umfarinum.

TN 28. aug. 2012: Nevndin beinir málið um part av fíggingini til MeN, tí talan er partvís um regulering í samband við Summarfestivalin. Nevndin er samd um at neyðuga reguleringin við Føroya Bjór verður framd beinan vegin.

MeN 29. aug. 2012: Ein samd nevnd mælir til, at kr. 200.000,- verða játtaðar frá "Kópakonuni" til endamálið. Ein minniluti, Óluva Klettskarð og Signhild V. Joensen, ger vart við, at talan er um óhepna mannagongd, nú eftir at vegagerðin er framd, at málið kemur til viðgerðar í Mentanarnevndini at játta pening til endamálið.

FíN 4. sept. 2012: Nevndin tekur undir við TN 28. august 2012 og MeN 29. august 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/112.
12/00717 Eykajáttan til tekniska økið, Reyðhúsvegurin - *1. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá teknisku umsiting, dagf. 20. aug. 2012. Óli M. Lassen og Elsebeth M. Gunnleygsdóttir býráðslimir og ávikavist 1. og 2. formaður í Teknisku Nevnd leggja málið um eykajáttan til tekniska økið fyri viðkomandi nevndir og býráð. Peningurin skal brúkast til Reyðhúsvegin, har talan eru um at fáa ymisk viðurskiftir í rættlag, sum kommunan áður hevur játtað borgarum í økinum. Biðið verður um 350 tús. kr. til Reyðhúsvegin, og skal hetta ætlandi fíggjast av meirinntøku kommununnar. (Sí annars omanfyri nevnda skriv)

Tilmæli:
Umsitingin tekur fult undir við, at mest akutta arbeiðið verður framt skjótast gjørligt vísandi til umstøðurnar í økinum, og vilja vit í hesum sambandi gera vart við, at ein eykajáttan uppá 350 tús. kr. av tøkum peningi er avgjørt ein hjálp, men er ikki nóg mikið til allar neyðugar matrikkulloysnir í økinum, og hetta eisini vísandi til omanfyri standandi. Umsitingin vil við hesum vísa á ta sera óhepnu støðuna við ongari játtan til "Byggibúningararbeiðini" sum steðgaðu upp í 2008, og hetta hava vit gjørt vart við á hvørjum ári.

Fíggjarligar avleiðingar:
Eykajáttanin, sum omanfyri nevndu biðja um, er kr. 350 tús. kr., og umsitingin vísir á, at tørvurin er einar 900 tús. kr.. Talan er um eina tilmælta øking av avsetingini til íløgu í inniverandi ári, ið sostatt ger rakstrarúrslitið fyri árið samsvarandi verri. Hetta er sjálvandi alt annað enn heppið, men

samstundis er tað sera óheppið, at borgarar, sum fyrst í 2009 hava fingið skrivliga at vita, at arbeiðini verða tikin uppaftur, tá fíggjarstøðan hjá kommununi batnar, framvegis bíða eftir neyðugum matrikkulloysnum.

TN 28. aug. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 20. august 2012

FíN 4. sept. 2012: Nevndin tekur undir við TN 28. august 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/113.
12/00595 Møguligt keyp av maskinu til Grótbrotið - *broyting av fíggjarætlan, 1. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 22. aug. 2012. Talan er um eina gravimaskinu, sum m.a. skal brúkast til at fylla upp í mobila knúsiverkið, og hevur Grótbrotið leigað maskinu til nevnda arbeiði. Árligi leigukostnaðurin er omanfyri 100 tús. kr. Vit hava staðfest, at hetta er ikki ein nøktandi loysn. Grótbrotið hevur tí seinastu árini fylgt við brúktsølumarknaðinum fyri maskinur og amboð. Víst verður til skriv leiðarans í juni 2012 í málinum.

Fígging:
Í málinum um Grótbrotið hevur umsitingin sum útgangsstøði arbeitt soleiðis, at útvegan av maskinum og amboðum til Grótbrotið skal ikki hava ávirkan á íløgurnar og raksturin hjá kommununi. Nú er greitt, at Grótbrotið fær eina inntøku uppá uml. 250 tús. kr. í 2012, sum stavar frá søluni av einum ídnaðarøki til Klaksvíkar Havn. (Samtykt er, at Kl. Havna rindar fyri byggibúningarkostnaðin v.m., sum eru útreiðslurnar hjá Grótbrotinum í samband við málið).
Sølan í Grótbrotinum er undir tí støði, sum vit hava roknað við í 2012, men útreiðslurnar eru tilsvarandi minni. Um valt verður at síggja burtur frá omanfyri nevndu inntøku, so roknar leiðarin í Grótbrotinum framvegis við, at avlopið hjá Grótbrotinum verður nakað omanfyri tær 137 tús. kr., sum fíggjarætlanin í 2012 leggur upp til.

Tilmæli:
Mælt verður til at geva Grótbrotinum heimild til at útvega neyðuga maskinu fyri upp til 300 tús. kr., og at fíggjarætlanin hjá Grótbrotninum verður broytt sambært niðanfyri standandi fyri at geva rúm fyri keypinum. Víst verður eisini til viðfestu uppseting fíggjarleiðarans, dagf. 23. august 2012.
Flutt frá konto 165200 *Umvæling og viðlíkahald* (í dag standa 1.330.000) ..... kr. 300.000 ,-
Flutt til nýggja konto: *Grótbrotið íløga*: ..... kr. 300.000,-

Sambært hesum broytist fíggjarætlanin fyri 2012, og skal málið tí samtykkjast tvær ferðir, og Fíggjarmálaráðið skal kunnast um broytingina.

TN 28. aug. 2012: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU dagf. 22. august 2012

FíN 4. sept. 2012: Nevndin tekur undir við TN 28. august 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/114
12/00743 Tættari samstarv millum Kunoyar Skúla og Skúlan á Ziskatrød

Frágreiðing um málið:
Kunoyar Kommuna hevur í skrivi sett fram ynski um skúlasamstarv við Skúlan á Ziskatrød, og av tí at málið kom so seint inn, og skúlabyrjan stóð fyri durum, er avrátt – í samráð við formannin í Mentanarnevndini at fylgja góðkenningingini fra Mentamálaráðnum 13. juli 2012.

Málið er bert umsitingarliga viðgjørt og eigur av røttum at verða viðgjørt í Mentanarnevndini og býráðnum, og verður henda viðgerðin við hesum løgd fyri til formliga góðkenning.

Sí skriv frá umsitingini, dagfest 24. august 2012, har greitt verður nærri frá málinum og mælt verður til at taka undir við hesi royndarskipan, við teimum treytum, sum MMR ásetur um tímatalið, at flyta til Skúlan á Ziskatrød, og har mælt verður til áseting av næmingagjaldinum fyri allar næmingarnar í hesi royndarskipanini.

MeN 29. august 2012: Nevndin tekur undir við tilmælinum 24. august 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/115
12/00527 Gøtuljós - meirnýtsla - *eykajáttan, 2. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av býráðnum 19. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/116.
12/00555 Økið kring frítíðarskúlan, Snjallubjallu - *eykajáttan, 2. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av býráðnum 19. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/117.
12/00423 Framtíð Klaksvíkar Róðrarfelags (stuðul) - *Flyting millum høvuðskontur, 2. viðgerð*

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av býráðnum 19. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/118.
12/00395 Kommunalar veitingar - Summarfestivalurin 2012 – *flyting mill. kontubólkar, 2. viðgerð*
(partur av 12/00179 Útgreining av íløgum mentanarøkið – stuðul 2012)

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð av býráðnum 19. juni 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

2012/119.
2006-19-075 Gamligarður - *2. viðgerð 2012*

Frágreiðing um málið:
Málið um inntøkuføring í kommunuroknskapin av uppspardum peningi til endamálið er samtykt tvær ferðir, harav tann fyrra er í 15. november 2011, meðan tann seinna er 24. januar 2012. Sambært galdandi roknskaparreglum og vegleiðingum, skulu slíkar samtyktir gerast báðar í viðkomandi fíggjarári, so krevst sostatt enn ein býráðssamtykt í 2012.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.